

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 12 - 2011

# Dagmar ótrógvaði oljuvinnuna

Ódnin Dagmar, sum herjaði Føroyar seinnapartin jóladag, gjørdist eisini ein avbjóðing fyri oljupallarnar og fólkið á teimum, tá hon fór eystur ímóti norsku strondini. Á Gullfaks-leiðini var ódn í gjár, og Statoil gjørdi av at taka 48 av teimum 118 fólkunum av Visund-pallinum. Samstundis vórðu fleiri tyrluferðir avlýstar. Bård Glad Pedersen, sum er talsmaður hjá Statoil, sigur við fjølmiðlarnar, at pallarnir eru bygdir til at tola tílíkt veður, men at tað er ikki serliga hugaligt at vera á teimum í slíkum líkindum. -Tí gjørdu vit av at taka ein part av fólkinum til lands, men tað hevur kortini ikki ótrógvað sjálva framleiðsluna, sigur talsmaðurin. Vindurin minkaði á oljuleiðunum í nátt, tá Dagmar fór inn yvir Noreg og Svøríki, og Statoil ætlar at flyta fólkið útaftur í morgin.